NSÍ-ÍF 1-1 (1-0):

# NSÍ kendi ikki sína vitjunartíð

**ÍF megnaði at venda, tá ið tap stóð í hendi, og í síðsta enda vóru teir nærri sigrinum, enn heimaliðið í Runavík var tað**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Heldur ikki í aðru royndini eydnaðist tað NSÍ at fáa fult á heimavølli. Tað kunnu teir fyrst og fremst takka sær sjálvum fyri. Tað er væl skiljandi, at teir iðra seg um, at teir ikki tóku av, tá ið møguleikin ella rættari møguleikarnir vóru har fyri at økja um leiðsluna og harvið gera fyritreytirnar hjá mótstøðumonnunum uppaftur torførari.

Men samstundis er væl skiljandi, at teir í síðsta enda vóru nøgdir við at fáa eitt stig, tí eftir at ÍF hevði javnað til 1-1, vóru tað teir, sum vístu størri tyngd í álopspartinum og sum harvið vóru nærri at fáa sigursmálið, enn teir á heimaliðnum vóru tað.

Fuglfirðingar tóktust ikki giraðir til verjuspæl, tá ið Birgir Sondum hevði bríkslað fyri fyrstu ferð. ÍF fekk eitt varskó beinanvegin, men tað rein ikki á teir, og longu í 4. minutti noyddist Allan Joensen í netið eftir bóltinum. Christian Høgni Jacobsen var við nærra stólpa frammanfyri ÍF verjuna, og bólturin sang í nettakinum.

Fótbóltsspælið var í 1. hálvleiki einki at reypa av. Intensiteturin var ikki serliga høgur, og málmøguleikarnir vóru fáir. ÍF hevði ongan møguleika, og NSÍ hevði ikki nógvar. Sentralu miðvallararnir hjá NSÍ vístu størri tyngd enn mótstøðumenninir, men tað var sjáldan, at tað eydnaðist at flyta bóltin millum fleiri enn tríggjar spælarar. Helgi L. Petersen, sum arbeiddi nógv, hevði onkra skotroynd av brotsteigarmarkinum, sum fór omanfyri, og í onkurm føri var tað um reppið, at tað gjørdist vandamikið eftir innlegg úr borðunum.

### Hekk betri saman

Eftir steðgin var heimaliðið væl upplagt. Teir funnu betri hvønn annan, og tað hevði avgjørt einki forgjørt verið í tí, um teir høvdu lagt seg framum við bæði tveimum og trimum málum.

Miðvallarin Andy Olsen fekk gyltan møguleika, men eftir innlegg úr høgru sendi hann við høvdinum og úr góðari støðu tætt undir málinum upp um.

Lítla løtu seinni legði Helgi L. Petersen av miðstrikuni og fram í tóma økið í høgru, har Gert Langgaard kom stunandi, áðrenn verjuspælararnir hjá fuglfirðingum. Gert rak væl inn í brotsteigin, og skotroyndini tóktist einki at bila burtursæð frá – og tað hevði alt at siga! - at bólturin fór dygst skeivu megin handaru stólparótina. Kanska skuldi Gert havt lagt upp á tvørs, men tað var einki forgjørt í, at hann royndi sjálvur, tí hann hevði runnið seg í góða støðu.

### Vendingin

Tíðliga í 2. hálvleiki noyddist NSÍ eftir lítlari løtu at gera tvær skiftingar, tí Jústinus og Gert vóru skaddir. Tá ið 2. hálvleikur var eitt lítið korter gamalur, gjørdi ÍF eina skifting, tá ið Gunnar Nielsen varð settur inn á miðvøllin, og tað tóktist sum um, at skiftingarnar høvdu tað árin á NSÍ, at teir mistu góðu rútmuna, sum teir høvdu havt fyrstu løtuna eftir steðgin, og at ÍF eftir lítlari løtu fekk um endan.

Stutt frammanundan at hann noyddist av vøllinum orsaka av skaða royndi Sylla, sum ikki var serliga væl upplagdur hesa ferð, úr seytjan metrum. Bólturin fór dygst framvið stólpanum. Hetta var fyrsta royndin hjá ÍF móti málinum, og tá sá tað út sum um, at ÍF so at siga fekk blóð á tonna.

NSÍ misti takið á miðvøllinum. Teir vóru sperdir, og teir tiltuskaðu sær eftir lítlari løtu trý gul kort.

John Thomsen var stinnur í vinstra verjuborði, miðverjarnir báðir og Eyðolvur R. Petersen høvdu eisini tak á framrættaðu heimamonnunum, og tá ið útjavnandi málið kom, var tað avgjørt ikki óvæntað.

Hornsapark varð lagt innfyri úr høgru, og eftir eitt sindur av afturi og fram átti Símun Eliasen, sum áður hevur verið vandamikil miðvallari, síðstu tonna á, og úr tveimum metrum stýrdi hann bóltin inn um Jens Martin Knudsen.

Løtuna eftir hetta hevði ÍF fleiri hálvar møguleikar. Gunnar Nielsen var einar tvær ferðir nær við, men einki spurdist burturúr. Í evstu løtu var um reppið, at akkurát innskifti Hjalmar Dalbúð, sum fyrstu ferð var á besta liðnum hjá NSÍ, stýrdi innleggi í kassan, men tað hevði mest sum verið ov nógv av tí góða, um tað hevði eydnast hjá honum.



*NSÍ trýsti allan fyrra hálvleik, men teir megnaðu ikki at avgera, og so kundu fuglfirðingarnir væl farið við øllum*
*savnsmynd*

## Spiltu seg burtur

**NSÍ venjarin heldur, at hansara áttu at havt syrgt fyri, at mótbrekkan hjá ÍF gjørdist uppaftur tyngri**

NSÍ
*Jóannes Hansen*

NSÍ vann í fyrsta umfarinum í Gundadali móti B36. Síðani hava teir ikki fingið fult. Hesa ferð vóru teir á sigurskós, men tað eydnaðist kortini ikki at fáa meiri enn eitt stig burturúr.

- Tað eru lítlar løtur, sum eru av avgerandi týdningi. Soleiðis var tað eisini hesa ferð. Vit løgdu okkum framum, og harvið gekk tað meiri fyri seg eftir okkum treytum, enn tað gekk fyri seg eftir teirra treytum. Men so leingi, sum munurin bara var eitt mál, so var alt framvegis opið. Eg var væl nøgdur við hugburðin í 1. hálvleiki, og fyrstu løtuna eftir steðgin hekk tað væl saman. Tá skuldu vit havt avgjørt, men tíverri eydnaðist tað ikki. Um vit tá høvdu havt økt til 2-0, so hevði mótbrekkan hjá teimum ivaleyst verið ov stór. Eg haldi, at tað kendist aftur í spælinum hjá okkara, tá ið fyrst Andy og síðani Gert noyddust at taka seg aftur, tí teir vóru skaddir í fótunum, vísir NSÍ venjarin, Trygvi Mortensen, á.

Hjalmar Dalbúð, sum framvegis er unglingaspælari, kom fyri fyrstu ferð á vøllin í landskappingardysti fyri besta liðið.

- Vit hava fleiri unglingaspælarar, sum venja saman við teimum bestu. Tað eigur at stimbra teir, um vit vísa teimum álit, og tað ætla vit at gera, staðfestir Trygvi Mortensen.

# Moralurin enn eina ferð í toppi

**ÍF venjarin iðrar seg um, at hansara menn fyrstu løtuna ikki vóru nóg neyvir í verjuspælinum, og hann rósar teimum fyri enn eina ferð at megna at koma afturíaftur**

ÍF
*Jóannes Hansen*

Fuglfirðingar hava nógvu tey seinastu árini ikki verið kendir fyri at vera so ógvuliga nærlagdir og ídnir, tá ið tað hevur gingið ímóti. Í so máta eru teir ikki at kenna aftur. Á Skála vóru teir aftanfyri 1-0 og 2-1, men teir megnaðu báðu ferðirnar at svara aftur.

Í Runavík legði heimaliðið seg beinanvegin framum, og í meiri enn ein tíma var NSÍ á odda, men so svaraði ÍF so dyggiliga aftur.

- Eg var ikki nøgdur við soleiðis, sum mínir menn tóku sær av verjupartinum fyrstu løtuna og í 1. hálvleiki yvirhøvur. Hugburðurin og nærlagnið vóru ikki nóg stór. Eftir steðgin broyttist hetta heilt nógv. Vit fingu betri fatur á teimum, og sum 2. hálvleikur leið, haldi eg avgjørt ikki, at tað var órímuligt, at vit megnaðu at javna, sigur ÍF venjarin, Petur Simonsen.

Næstu stóru vikuna eigur ÍF fleiri spennandi avbjóðingar fyri framman. Sunnudagin skulu teir spæla á heimavølli ímóti TB, og annan hósdag skulu teir í steypakappingini spæla ímóti HB.

- Vit taka eina uppgávu í senn. TB dysturin verður torførur, og at tað ikki gongur av sær sjálvum á heimavølli, sóu vit ímóti B36. TB undirstrikaði sunnudagin, at teir ikki bara ætla sær at leggja rygg til tap. Og so verður tað spennandi at hitta meistararnar og steypavinnararnar í fjórðingsfinaluni í steypakappingini, heldur Petur Simonsen.

### Fakta um dystin:

**NSÍ-ÍF 1-1 (1-0)**
1-0: Christian Høgni Jacobsen 4.
1-1: Símun Eliasen 77.
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen - Brynjolvur Nielsen, Óli Hansen, Dánial Hansen, Jónstein Petersen - Gert Langgaard (Einar Hansen, 53.), Helgi L. Petesen, Jústinus R. Hansen (Kári Hansen, 50.), Andy Olsen (Hjalmar Dalbúð, 87.) - Christian Høgni Jacobsen, Ike
***Gult kort:*** Helgi L. Petersen, Andy Olsen, Óli Hansen
**ÍF:** Allan Joensen - Eyðolvur R. Petersen, Poul Ennigarð, Bartal Eliasen, John Thomsen - Fritleif í Lambanum (Gunnar Nielsen, 58.) Símun Eliasen, Høgni Zachariasen, Rúni Elttør - Sylla (Atli Petersen, 65.) Magni á Lakjuni
***Gult kort:*** Fritleif í Lambanum, Høgni Zachariasen
**Dómari:** Birgir Sondum